gult14 cyan14 magenta14 svart14



# TIT SPYRJA VIT SVARA



Bergur Hanusson, djóralækni · Heri Joensen, prestur · Heri Kragesteen, sálarfrøðingur · Ingi Højgaard, løgfrøðingur · Jens Andreassen, lækni · Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur · Jón Klein Olsen, politistur · Jón Kragesteen. Ferðslutrygd · Julianna Næs, pedagogur · Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi · Turid Thomsen, lestrarvegleiðari · Marius Staksberg, málfrøðingur

LØGREGLAN

## Hvørji krøv verða sett eldri bilførarum

Í grannalagnum hjá okkum hevur ein eldri maður júst fingið koyrikortið longt. Um hann hevur verið til roynd ella ikki, vita vit ikki, men sum skilst var tað útgingið. Hesin eldri maðurin er merktur av elli, hyggur seg ikki nóg væl um, tá ið hann koyrir, og er eftir okkara tykki ikki ein ábyrgdarfullur bilførari - rætt og slætt tí, hann er vorðin ov gamal. Vit kundu hugsað okkum at fingið at vita, hvørjar treytir verða settar í hesum førum. Skulu fólk, hvørs koyrikort ganga út, til nýggjan koyriroynd? Og hvat verður annars hugt eftir?

*Í ferðslulógini grein 18b stk. 1 stendur skrivað, at koyrikortið hevur gildi til eigarin hevur fylt 70 ár. Í grein 18b stk. 4 stendur, at tá ið gildistíðin er úti, kann koyrikortið verða endurnýggjað, um eigarin lýkur treytirnar.*

*Treytirnar eru, at øll sum farin eru upp um 70 ár, skulu til ein lækna og fáa útfylt eina læknaváttan. Har skal læknin staðfesta um viðkomandi er egnaður á lógligan og forsvarligan hátt, at føra bil. Um læknin metur viðkomandi at vera egnaðan, vil Bileftirlitið greiða tað sum ein avgreiðsluspurning at geva persóninum koyrikortið aftur. Tað vil so hava gildi í 5 ár.*

*Tað sum læknin hyggur eftir er, um viðkomandi hevur nóg góð eygu, oyru og er edrúuligur, og annars sálarliga og likamliga førur fyri at føra bil. Um læknin metir, at persónurin ikki er egnaður at føra bil, ella læknin hevur onkra viðmerking viðvíkjandi heilsustøðu hansara, vil læknin skriva til Bileftirlitið, at "personen anbefales praktisk prøve", og verður hetta so upp til Bileftirlitið at avgreiða.*

*Læknin kann eisini meta, at prsónurin hevur ein ávísan grad av trupulleikum og kann spurningurin so vísast til landslæknan ella "Sundhedsstyrelsen".*

LESTRARVEGLEIÐARIN

## Sjálvlestur í sálarfrøði

Sálarfrøði hevur altíð havt mín áhuga. Ber til at vera sjálvlesandi innan sálarfrøði, tað vil siga búgva í Føroyum, men verða knýtt at donskum lærustovni. Eru fleiri stig í útbúgvingini, tvs. hjágrein og høvuðsgrein, og hvussu nógv ár taka tær? Hvørjar treytir fylgja? Hvussu eru møguleikarnir fyri studningi? Havi eina kandidatútbúgving frammanundan.

*Sjálvlestur og fjarlestur á universitetsstigi í Danmark eru lestrarhættir, sum koma undir "Åben uddannelse". "Åben uddannelse" eru útbúgvingar, sum eru skipaðar til fólk við útbúgving og starvi. Tær ávísu útbúgvingarnar á teimum ávísu útbúgvingarstøðunum verða so lagdar til rættis við fyrilestrum, skeiðum, fjarlestri og øðrum.*

*Lestur í sálarfrøði, sum kemur undir "Åben uddannelse" er hjágrein í sálarfrøði. Tað vil siga eitt til hálvt annað ára lestur, sum gevur rætt til at undirvísa í sálarfrøði á t.d. miðnámsskúlum, og sum tí krevur eina kandidatútbúgving ella líknandi sum upptøkutreyt. Sálarfrøði undir "Åben Uddannelse" er at finna á universitetunum í Roskilde, København og Aalborg, har tey serliga í Aalborg lýsa við fjarlestri.*

*Statens voksenuddannelsesstøtte (SVU) er lestrarstuðul til fólk, sum eftirella víðariútbúgva seg í Danmark. Hesin stuðul fæst tó bert til fulltíðarlestur, og útbúgvingarnar undir "Åben uddannelse" eru oftast skipaðar sum parttíðarlestur.*

*Á heimasíðuni www.ivuc.dk finnast slóðir til tey áðurnevndu universitetini og teirra útbúgvingar í sálarfrøði.*

LØGFRØÐINGURIN

## Hvat fær kona mín

Fyri trimum árum síðani flutti kona mín heimanifrá. Síðan tá hevur hon einki goldið til húsini. Hon hevur fast arbeiði. Eg gjaldi 5500,- krónur um mánaðin fyri húsalán. Við møguligan hjúnaskilna hevur hon rætt til helvtina av yvirskotinum við sølu av húsinum. Eg – maður hennara – standi fyri skeytinum og lániskjølum.

*Um talan er um felagsogn verður við skifti eftir møguligum hjúnarskilnað gjørt upp soleiðis, at búpartarnir hjá konu og manni verða gjørdir upp hvør sær. Síðani verður helvtin av møguligum yvirskoti, tað vil siga ogn frádrigin skuld, at rinda hinum partinum. Er einki yvirskot í einum búparti verður einki at gjalda til hin partin.*

*Í serligum føri kann hædd tó takast fyri, at annar parturin einsamallur hevur goldið niður uppá húsalánið, um so er, at upphæddin, ið goldin er, er væl meir enn ein vildi goldið í húsaleigu fyri ognina.*

## Hvar er lágmarkið?

Vit eru nøkur, sum hava sitið og kjakast um, hvar seksuella lágmarkið er. Onkur meinar, at tað er 15 ár fyri bæði kynini, men onkur annar meinar, at tað er 15 ár fyri gentur og 17 ár fyri dreingir. Vit spyrja tí tykkum, hvat rætta svarið er?

*Lágmarkið er 15 ár fyri bæði kynini.*

### Spyrjið serfrøðingarnar

Hava tit spurningar til serfrøðingarnar, kunnu tit senda teir til:

**Sosialin**
postsmogu 76
110 Tórshavn

ella á fax: 314720
og teldupostadressuna:
spyr@sosialurin.fo


STØÐUGT FLEIRI HALDA Sosialin

WWW.SOSIALURIN.FO

Tíðindablaðið **sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Sosialurin







gult15 cyan15 magenta15 svart15



# Flaggrøða hildin 25. apríl 2001



– Góðu fólk, sum eru komin saman her til tað árliga flaggdagshaldið. Havnar Hornorkestur hevur nú í mong ár átikið sær at fáa hetta flaggdagshald í lag, og tøkk skulu teir hava fyri tað.

Í ár hevur Havnar Hornorkestur heitt á meg at bera fram nøkur orð henda 25. apríl.

## Apríl

Í einum av søgum sínum letur skaldið Heðin Brú seyðamannin Høgna hin gamla siga: »Prílurin er so svikaligur«. Hann hugsaði helst mest um stórkava, seyð og lembing.

Høgni hin gamli hevði rætt, apríl mánaður hevur ikki bert verið svikaligur og við stórkava, tað er eisini í hesum mánaði, at størstu skaðar eru hendir her á landi á sjónum. Tað sigst, at 30. apríl gingu 50 bátar burtur, og vit vita, at 30. apríl 1870 gingu 5 bátar burtur í Føroyum.

Nú eg hugsi um henda apríl mánað, rennur so mangt fram fyri ein um hendingar í honum. Danir hava fyri trimum vikum síðani minnishildið 200-ára dagin tann 2. apríl sum tað, teir nevna »Slaget på Reden«. Tað var 2. apríl 1801 at enski herflotin við Nelson admirali stevndi oman Oyrasund og beint fyri dyrnum hjá Keypmannahavnarum so gott sum sorlaði tann danska flotan, áðrenn danir bóðu um grið.

Hóast tap og niðurlag varð kvæði ella sangur yrktur um hesa hending og sungin av dønum upp til okkara tíð, og er fyrsta regla henda: »Så kæmped de helte af 2. april«. So nakað av knotum man hava verið í dønum henda dag.

Eg fari her at skoyta uppí, at 7 ár seinni, í 1808, fekk tann dansiki herflotin mønustingin við Sjællands Odde, tá sjóhetjan Peter Willemoes fall við øllum monnum sínum. Hetta er sama árið, sum okkara maður Nólsoyar Páll eisini fall – so ella so við sínum monnum.

Hesir apríl-dagar og hesi tap hava uttan iva verið við til, at friðarsáttmálin í Kiel í 1814 kom í og kom at hava eina ómetaliga ávirkan fyri øll Norðurlond og framtíð teirra, men vit kunnu ikki í dag siga nakað um, hvussu støðan millum Norðurlond og hjá øllum Norðurlondum hevði verið, um hesin sáttmáli í Kiel ikki varð gjørdur.

Men lat okkum venda okkum til ein apríl mánaða, sum liggur nærri okkara tíð.

Sum vit vita, varð Danmark hersett av týskinum eina morgunstund 9. apríl 1940. Sama morgun byrjaði hersetingin av Noreg, og 13. apríl setti eingilsmaðurin sín fót á land her hjá okkum. Sjálvur var eg komin til Havnar í 1938 og var í 1940 sekstan ára gamal. Øll spurdu: Hvat verður nú, hvussu verður vorðið, hvør ræður her á landi, men svar fanst einki tá. Løgting okkara var komið saman stutt fyri 9. apríl, og tí vendu eyguni sær móti tí, men haðani fekst lítið og einki at vita, tí løgtingsmenn sótu aftanfyri stongdar fyr. Orsøkin til hetta var sjálvandi, tí vit vóru í einum slagi av krígsstøðu, í øllum førum kunnu vit nýta eitt annað orð: »Føroyar í undantaksstøðu«.

## Her í Føroyum

Einki hoyrdist, hvussu stýrislag okkara kom at vera, men brádliga stakk seg upp spurningur, sum skjótt mátti loysast, tí skip okkara høvdu nú einki góðkent flagg at sigla undir, og tá tað hoyrdist, at løgtingsmenn innanhýsis vóru ósamdir, og tá amtmaðurin, ið nú var einasta umboðið hjá donsku stjórnini her á landi, helst kendi seg í villareiði, hvat gerast skuldi, varð boðað til fundar á Tinghúsvøllinum, har so mangur fundurin hevur verið hildin, og eins og romararnir høvdu sítt Forum Romanum, hevði Havnar býur og fyri so vítt allar Føroyar sítt forum, og sum kann kallast Havnar forum – Tinghúsvøllurin.

Har var í trý kvøld – tann 23., 24. og 25. apríl hildnir fundir. Teir báðar fyrru vil eg kalla kravfundir og tann síðsti fagnaðarfundur.

Fundarfólki gekk til teir ymisku myndugleikar, sum høvdu við hetta málið at gera, kravdu at tað flaggið, sum so nógvir føroyingar tá høvdu nýtt á heimligari grund í eini 20 ár, skuldi góðkennast at nýta á høvunum. Boðini komu úr London um kvøldið 24. apríl, og tey vóru, at frá 25. apríl 1940 var tað føroyska flaggið einasta lógliga flagg at føra á føroyskum skipum.

Onkur vil kanska siga, at her hava vit orðatakaið »Neyð lærir nakna konu at spinna«, men tað er ikki heilt rætt, tí sum sagt í 20 ár, síðani 1919, høvdu føroyingar tikið Merkið at sær sum teirr aflagg, og var tað tá nýtt um allar Føroyar. Ein kann siga, at tann 25. apríl var ikki neyðugt at spinna, tí flaggið – klæði – lá klárt at fara í. Lit ella útsjónd var eingin orsøk at trætast um. Tí kundi London so skjótt og avgjørt boða frá, at flagg okkara var altjóða viðurkent.

Lat meg leggja aftrat, at gott er, at flaggspurningurin tá varð loystur og ikki er við í tí politisku rembing, sum uppi er nú. Kanska vit mega ásanna, at tað tíverri skuldi ein veraldarbardagi til fyri at Merkið fekk altjóða góðkenning. Í dag liva allir føroyingar undir Merkinum, sum er ein partur av felags samleika føroyinganna.

Eg kann her skoyta uppí eina lítla hending, mær var fyri ein av hesum apríldøgum. Eg kom omaneftir Áarvegnum og komin oman um Vertshúsið, tá standur Jóannes Patursson uttanfyri á trappusteininum. Hann rópar á meg við síni snjøllu rødd: »Ungi sandingur, munur er á«. Eg svaraði: »Ja, okkara millum er stórur munur«. Hann smíltist við, og tað gjørdi eg eisini, men so segði hann: »Munur er á. Meðan frændir okkara í Noreg berjast fyri at verja teirra land, berjast vit fyri at fáa okkum eitt flagg«. So legði hann afturat: »Norðmenn fara at tapa, og vit at vinna«. Og so bleiv. Sigast má tó, at munur var á bardaga.

## Merkið

Mangan havi eg hugsað um, hví upprunamenninir til flaggið góvu tí navnið »Merkið«, men fara vit aftur í tíðina, vita vit, at uppi var at gera fuglin Tjaldrið til okkara tjóðarmerki. Eisini var frammi, at gamla innsigli »veðrurin« skuldi vera tað. Ja, eisini var uppskot um at seta veðrin inn í Dannebrog sum ein part av tí, men hetta bleiv skjótt slept. Hugsanin hevur helst verið, at vit føroyingar skuldu hava eitt frámerki í tí danska flagginum, eins og londini undir tí bretsku trónini høvdu teirra frámerki.

Men flaggið kom ikki at bera heitið »Frámerki«, men fekk beinanvegin heitið »Merkið«, og so væl var undirtøkan fyri hesum, at Hans Andreas Djurhuus beinanvegin í 1920 yrkti sangin: »Sjá tú blánar«. Sama ár varð ungmannafelag stovnað her í Havn og góvu teir felagnum navnið »Merkið«. Hetta felag hevði heilt fram móti fimmtiárunum ein ómetaligan týdning, mentanarliga og á annan hátt bæði fyri ung og gomul.

Vit siga oftari og oftari tað føroyska flaggið, men latum okkum heldur varðveita upprunaheitið »Merkið«. Hví skal okkara flagg ikki eisini hava eitt navn eins og onnur lond so sum »Union Jack«, »Stars and Stripes«, »Tricolorin« og »Dannebrog«.

Vit menniskju hava hvør í sínum lagi nakrar ideologiir ella visiónir ella mál, vit vilja náa. Og gott við tí, men skulu vit náa hesum málinum má skil vera í fyri at koma fram at málinum. Um ikki hugsan, ætlan og tey verunligu viðurskiftini eru í samdrátti, kemst ikki fram at endamálinum.

Málstríðið er av, flaggstríðið er av. Eftir stendur at fáa okkum eina stýrisskipan, sum alt Føroya fólk skal liva undir í sátt og semju. Jóannes bóndi segði í apríl 1940: »Vit fara at vinna«. Hesi orð vil eg umseta til, at vit umsíðir mega finna eina stýrisskipan, sum verður »Føroya stýrisskipan« og sum verður tann endaliga loysnin. Vit siga, at tolin trívst, men vit mega ikki bert vera tolin, tí so hendir einki. Tað má arbeiðast og virkast framhaldandi. So ivist eg ikki í, at stýrislag Føroya kemur at standa á tryggum støði. Eitt støði, sum verður til gleði og sóma fyri Føroya fólk og til nakað av stoltleika móti útheiminum.

Tann kendi fólkalívsfrøðingurin Svend Grundtvig, sonur stóra sálmaskaldið gamla Grundtvig, arbeiddi nógv ár saman við okkara V. U. Hammershaimb við kvæðum okkara og fólkalívsfrøði. Hann hevði eisini, um ein so kann siga, sína ideologi. Ideologiina kroysti hann saman í tvær reglur og áheitan hansara kunnu vit øll taka undir við, og er áheitan hansara soljóðandi:

»Ren og klar skal Nutid føre
fortids Røst til Fremtids Øre«

Takk fyri at tit lýddu á.